**Semja millum Felag Tænastumanna Landsins og Fíggjarmálaráðið**

Avtalan verður endurnýggjað fyri tíðina frá 1. oktober í 2011 til 1. oktober í 2015.

**Lønarhækkanir**
Tann 1. oktober í 2011 hækka mánaðarlønir 32.000 kr. og undir við 220 kr. Mánaðarlønir 50.000 kr. og yvir hækka ikki. Linjurætt fall harímillum.
Tann 1. oktober í 2012 hækka mánaðarlønir 32.000 kr. og undir við 220 kr. Mánaðarlønir 50.000 kr. og yvir hækka ikki. Linjurætt fall harímillum.
Tann 1. oktober 2013 hækka mánaðarlønirnar 190 kr. + 0,9%
Tann 1. oktober 2014 hækka mánaðarlønirnar 1,9%
Sí hjáløgdu lønartalvur.

**Tænastuferðir**
Í avtaluni um tænastuferðir eru gjørdar nakrar broytingar. Longdin er sett til 10 km í samsvari við lóg um ferðastuðul. Heimferðardagurin er strikaður. Frádráttur 15% fyri morgunmat er strikaður. Sí avtalu, sum skal koma í gildi tann 1. mars 2013.

**Umflokkanir**
Gjørd er avtala um tvær umflokkanir.

**Protokollat**
Partarnir eru samdir um at endurskoða avtaluna um, hvat ið skal henda við eftirlønini, tá ið tænastumenn fara úr starvi áðrenn teir hava fylt 67 ár. Fíggjarmálaráðið fer eisini at taka hini feløgini við í arbeiðið.

*Á Argjum tann 5. februar í 2013*

*Felag Tænastumanna Landsins* *Fíggjarmálaráðið*

Meinhard Gaardlykke Jørgen Niclasen

/

Snorri Fjallsbak